# Kend nøvn í Orkis á Glyvrum

**Tá ið ferniseringin var hóskvøldið kl. 19, spældu Jóannes S. Hansen og Monika Stauss á ávikavist harmoniku og violin og tey, sum hugdu framvið, fingu okkurt at leska sær við**

LISTAFRAMSÝNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hóskvøldið kl. 19 læt áhugaverd listaframsýning upp í kjallaranum í Orkis í Saltangará.

Framsýningin verður opin í vanligari upplatingartíð einar fjúrtan dagar fram. Saman við listaframsýningini, sýnir Orkis eisini fram sýnar nýggjastu vørur, sum júst eru heimkomnar.

Tey, sum sýna fram síni listaverk á hesi framsýningini, eru kendi leirvíksmálarin, Sámal Toftanes, Jóannes S. Hansen, Kára Løkin og Ketty á Fríðriksmørk.

Sámal, Kára og Ketty hava øll traðkað sínar »barnaskógvar« innan listina á kvøldskúla í máling og list hjá Jóannesi, sum bæði hevur undirvíst á Glyvrum, Fuglafirði og á Strondum.

**Kaffi og tónleikur**

Sjálvur plagar Jóannes at taka til, at kemur ein listamaður undan í hvørjari bygd, er nógv vunnið.

Tá ið ferniseringin var hóskvøldið kl. 19, spældu Jóannes S. Hansen og Monika Stauss á ávikavist harmoniku og violin og tey, sum hugdu framvið, fingu eisini okkurt at leska sær við.

Ætlandi vóru øll listafólkini við, tá ið framsýningin læt upp.

Einir 25 málningar verða við á framsýningini í Orkis, og teir eru allir til sølu.


*Sámal Toftanes er vorðin kendur og umtóktur sum listamálari*

## VEÐRIÐ


Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og landsynningi, út á seinnapartin í støðum upp í ein strúk og um náttina andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi. Skýggjað og ælaveður, um náttina regn. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi. Skýggjað og regn ella ælaveður. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Minkandi niður í gul av ymsum ættum, um náttina stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi. Fyrri tað mesta turt og møguliga sólglottar, men um náttina regn. Hitin millum 4 og 7 stig, um náttina umleið 8 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi, seinni upp í skrið av vestri, møguliga meira í hvirlum. At byrja við regn, seinni skýggjað og ælaveður. Hitin millum 6 og 10 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 4 |
| Nuuk | 7 |
| Qaqortoq | 5 |
| Ammassalik | 1 |
| Saint John's | 1 |
| Halifax | 8 |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 13 |
| Tromsø | 6 |
| Bergen | 6 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | – |
| Keypmannah. | 7 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | 2 |
| Berlin | – |
| Warzawa | ÷1 |
| Kiev | ÷1 |
| Bukarest | – |
| Paris | 8 |
| Madrid | 11 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 18 |
| Athen | – |
| Malta | 19 |
| Tunis | 20 |
| Beijing | 7 |
| New Dehli | 25 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | – |
| New York | 13 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 13 |

### LUFTTRÝSTIÐ


Eitt lágtrýst í ein útsynning úr Írlandi fer inn yvir Bretsku oyggjarnar og dýpist. Brúgvaløg haðani hava regn við sær inn yvir Føroyar.


Mánadagin og týsdagin kemur eitt lágtrýst inn yvir Føroyar vestaneftir og hevur vind og regn við sær.

### HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 12/11 kl. 06⁰⁰– 13/11 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,2°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

### AVFALLIÐ



Avfallið: 3,0 mm – mált frá 12/11 kl. 06⁰⁰–13/11 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í november: 53,9 mm



fæst á apotekunum kring landið

## VESTFALLSKYRRINDI

9. november: Fullmáni
10. november: Mánin longst frá jørðini
17. november: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 14. nov | 10.12 | 22.35 | 09.12 | 21.35 | 09.27 | 21.50 | — | 12.12 | 00.49 | 13.12 | 08.27 | 20.50 | 07.27 | 19.50 | 10.27 | 22.50 | 11.27 | 23.50 | 09.57 | 22.20 | 11.12 | 23.35 |
| 15. nov | 10.58 | 23.21 | 09.58 | 22.21 | 10.13 | 22.36 | 00.35 | 12.58 | 01.35 | 13.58 | 09.13 | 21.36 | 08.13 | 20.36 | 11.13 | 23.36 | — | 12.13 | 10.43 | 23.06 | 11.58 | — |
| 16. nov | 11.44 | — | 10.44 | 23.19 | 10.59 | 23.34 | 01.21 | 13.44 | 02.21 | 14.44 | 09.59 | 22.34 | 08.59 | 21.34 | 11.59 | - | 00.36 | 12.59 | 11.29 | — | 00.21 | 12.44 |
| 17. nov | 00.19 | 12.55 | 11.55 | — | - | 12.10 | 02.19 | 14.55 | 03.19 | 15.55 | 11.10 | 23.45 | 10.10 | 22.45 | 00.34 | 13.10 | 01.34 | 14.10 | 00.04 | 12.40 | 01.19 | 13.55 |

5 707265 100050 >